gult20 cyan20 magenta20 svart20



# NSÍ spældi HB av vøllinum

**Avrikið hjá teimum gulu og bláu var nógv tað mest sannførandi í ár, meðan hvítklæddu HB menninir vóru langt frá støðinum, sum í fyrstu umførunum bar sannførandi sigrar við sær**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Millum annað var Sjúrður Jacobsen sera eyðsýndur á NSÍ-liðnum, sum í tøkum tíma fann stórspælið fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HB varð sunnudagin sent til hús úr Runavík við tapi. Eitt er, at HB tapti, men nakað annað er mátin, sum teir taptu uppá. Fyri einum mánað síðani og minni enn tað, tá fyrstu umførini í landskappingini vóru á skránni, sýndu teir í HB spæligleði, bólthaldarin hevði altíð fleiri møguleikar at senda víðari, og í verjuspælinum vóru teir sera sannførandi.

Nógv er broytt síðani tá. Í Runavík var talan um ein ellivu manna flokk, sum tóktist uppgevandi. Á miðvøllinum vóru teir undirmannaðir og lógu langt frá mótstøðumonnunum. Rúni Nolsøe var sera verjukendur og als ikki í stýrandi leiklutinum, sum hann plagar at hava. Í borðunum vóru teir ótryggari, enn teir hava verið, og í miðverjuni bilaði nógv.

Uni Arge og Bárður Mortansson fingu lítið at arbeiða við, og teir formáddu sær ikki serliga nógv ímóti NSÍ verjuni við Dániali Hansen á odda, tá teir endiliga fingu bóltin.

Men áðrenn vit fara at rósa NSÍ, eiga vit at leggja afturat, at tað var um reppið, at HB fekk um endan og legði seg framum bæði við einum og tveimum málum. Um tað hevði eydnast, so hevði talan ivaleyst verið um heilt øðrvísi dyst.

Trettan minuttir vóru farnir, tá Uni Arge javnaði til 1–1. Allan Mørkøre, sum annars ikki hevði serliga eyðsýndan leiklut hesa ferð, fekk góðan diagonalbólt frá Rúna Nolsøe og út í høgra borð, hann dróg langt fram og langaði flatt innfyri. Skotroyndin hjá Bárði Mortanssyni tóktist hálvkiksað, men Uni Arge var á rætta staðnum røttu løtuna og beindi bóltinum í málið.

Tíggju minuttir seinni heilkiksaði Arnfinn Langgaard sending tvørturum. Uni Arge setti ferð á, men á brotsteigarmarkinum vardi Jens Martin Knudsen við beinparadu. Og løtu seinni var Jens Martin aftur bjargingarmaðurin. NSÍ misti í uppspæli í vinstru, Allan Mørkøre setti ferð á í brotsteigin, flatu skotroyndini bilti einki, men málverjin bjargaði meistarliga.

## Spældu fótbólt

Heimasigurin átti í tølum at havt verið nógv meiri sannførandi enn 2–1. NSÍ hevði stóra leikliga yvirvág, í longum løtum spældu teir sera væl. Høvdu teir ikki verið so strongdir, tá álopini skuldu avsluttast, so kundu teir havt fingið fleiri upplagdar møguleikar og ivaleyst fleiri mál. Skotroyndir langt úti av vøllinum vórðu valdar í staðin fyri blankt fríspælandi stikkbóltar, og í 1. hálvleiki valdi Sjúrður Jacobsen at stúta diagonalan frísparksbólt úr høgru tvørturum aftur í staðin fyri at royna sjálvur í handara síðunetið.

NSÍ spældi ofta hugflogsríkt. Hesa ferð vóru bóltspælararnir Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Sjúrður Jacosben og Eddie Mikkelsen á miðvøllinum, meðan Sonni L. Petersen var einsamallur á toppinum (Christian Høgni Jacobsen var ikki við). Miðvallararnir dusaðu sær, tí teir vóru yvirmannaðir. Sammett við fyrr í ár var talan um nógv tað mest sannførandi spælavrikið. Eitt tvey samanspæl, yvirlapp, diagonalar sendingar og meiri av tí slagnum sást aftur og aftur, og serliga fyrra partin av fyrrra umfarinum eltu heimamenninir HB alla staðni á vøllinum, tá gestirnir høvdu bóltin. Tað kom ikki væl við hjá HB.

## Heimamálini

NSÍ kom á odda beinanvegin. Eddie Mikkelsen royndi við skoti, Bárður Johannesen hálvbjargaði, og Sonni L. Petersen, sum er við at mennast til ein eftir føroyskum viðurskiftum fínan álopsmann, stýrdi bóltinum í kassan.

Sum 1. hálvleikur leið, fór ferðin eitt sindur niður, men í 2. hálvleiki var munurin so eyðsýndur, at HB menninir í mótloysi fóru at yppa øksl, veipa við ørmunum og hyggja upp á dómaran.

Ein av trupulleikunum hjá NSÍ er, at teir hava eini trý punkt, har bóltførleikin er alt ov vánaligur. Í 2. hálvleiki broyttu teir til 4–4–2. Ken Nónklett kom inn í álopið, og hann hevði bara verið á vøllinum í seks minuttir, tá hann fyri opnum máli við handara stólpan umsetti flatt innlegg úr vinstru til sigursmálið.Uppspælið byrjaði aftarlaga í vinstru. Ian Højgaard og Sjúrður Jacobsen, sum vóru teir, ið stóðu sterkast í myndini á heimaliðnum, vóru uppií.

## Tørva royndir

Sum tíðin leið, royndi HB at spenna álopsbogan. Tað var ein smeitur, at Hans á Lag longu undan steðginum noyddist at fara burturúr. Rógvi Jacobsen fór í miðverjuna at hjálpa Jón Róa Jacobsen. Teir høvdu báðir komið væl við longri frammi á vøllinum.

Tá 25 minuttir vóru eftir, fór Jón Rói í álopið fyri Bárður Mortansson, og Eyðfinn Fjalsbak kom í miðverjuna. Men HB megnaði ongantíð rættuliga at kroysta NSÍ.

Síðstu løtuna sást væl, at teir í NSÍ ikki hava nógvar royndir í at halda tørn. Jens Martin Knudsen døllaði sær, tá hann skuldi taka málspark, og Sjúrður Jacobsen fekk gult kort, tí tað tók ov langa tíð at taka eitt innkast. Men spælið var ikki, sum tað átti at havt verið í sovornari støðu. Í staðin fyri at gera nyttu burturúr tamarhaldinum, sum teir høvdu á miðvøllinum, so vóru teir á heimaliðnum alt ov málfokuseraðir. Tí vóru álopini skjótt avgreitt, og harvið góvu teir bóltin aftur til HB.

Ikki minst tá HB var vorðið undirmannað, eftir at Allan Mørkøre hevði sæð reytt fyri púra óneyðugu takling, áttu líkindini at havt verið góð til eitt tvey samanspæl og síðuskift hjá NSÍ. Men tað leggja teir vertin í nú. NSÍ spældi seg – við undirstriking av spældi – til trý týdningarmikil stig. Og í HB mugu teir brúka tær báðar næstu vikurnar at leita eftir spælinum, sum fyri trimum og fýra vikum síðani tóktist fara at bera langt.

**NSÍ- HB 2-1 (1-1)**
1-0: Sonni L. Petersen 2
1-1: Uni Arge 12
2-1: Ken Nónklett 52

**Dómari:**
Petur Hansen (LÍF)

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Rúni Rasmussen, Arnfinn Langgaard, Dánial Hansen, Jónstein Petersen – Elian Hansen, Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen
**HB:** Bárður Johannesen – Bárður Christiansen, Hans á Lag, Jón Rói Jacobsen, Janus M. Joensen – Allan Mørkøre, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen – Uni Arge, Bárður Mortansson

## Taktikkfundurin skal vera leygarkvøld

**NSÍ venjarin heldur, at tað hevði týdning, at hann og skerda liðið ikki høvdu HB dystin beint fyri nøsini, tá teir løgdu taktikk**

Tað sást ikki á avrikinum á vøllinum. Men tað er ein veruleiki, at fimm av monnunum, sum plaga at vera ímillum teir fyrstu ellivu hjá NSÍ, sótu skaddir uttanfyri sunnudagin.

Umframt Christian Høgna Jacobsen vóru skaddu menninir Gert Langgaard, Djóni N. Joensen, Kári Hansen og Martin Glancy, skotin, sum NSÍ nú hevur gjørt sáttmála við.

– Vit hittust leygarkvøldið at tosa um, hvussu vit skuldu taka HB. Hetta var ein góð roynd. Spælararnir høvdu tíð og umstøður at lurta og tosa, uttan at skula hugsa um, at dysturin skuldi byrja hvørja løtu, er nakað av tí, sum NSÍ venjarin, Petur Mohr hevði at siga á heimasíðuni hjá NSÍ eftir dystin.

Prátið man hava verið gott. NSÍ menninir høvdu frágera góðan hugburð. Teir vóru raskir, teir spældu væl, og teir fingu trý stig. Tað man merkja, at tað í framtíðini fara at vera boð eftir NSÍ monnunum leygarkvøld.
*jh*

gult21 cyan21 magenta21 svart21



# Tað tódnaði hjá Toda og teimum

**Lyngby var væl upplagt, tá teir argaðu grannarnar og syrgdu fyri, at spurningurin um, hvør skal vinna DM, fer at hanga í leysum lofti í knappar tvær vikur**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*Saman við liðfelaganum úr Suðurafrika er Todi limur í vandamesta álopsparinum í Danmark*

Spenningurin er tryggjaður hjá føroyska ferðalagnum, sum ætlar sær av landinum og í Parkina í Keypmannahavn at hyggja at, tá FCK og Brøndby annan sunnudag í næstsíðsta umfarinum bresta saman.

Teir gulu úr Brøndby vóru sera hepnir, tá teir á útivølli í Silkeborg vunnu 1–0. Málið fingu teir í síðsta minuttinum undan steðginum.Svenski miðvallarin, Mattias Jonsson smekkaði til, bólturin rakti í ein av verjuspælarunum, og so noyddist landsliðsmálverjin, Peter Kjær, at standa og hyggja at, meðan bólturin fór í málið.

Sigurin hjá Brøndby var tann fyrsti í Silkeborg síðani 1997. Bæði liðini høvdu møguleikan at elta FCK í toppstríðnum. At Brøndby vann, og at Silkeborg tapti hevur við sær, at steypavinnararnir úr Silkeborg so at siga eru dotnir afturav í stríðnum um DM. Teir kendu tað eyka harmuligt, tí sannleikin var tann, at tað vóru teir, sum høvdu mesta spælið, og tað vóru teir, sum høvdu teir størstu møguleikarnar. Men teir vóru ikki nóg neyvir, og so stóð 37 ára gamli Mogens Krogh framúr væl í málinum hjá Brøndby.

At nógv stóð upp á spæl sást aftur á kortunum. Brøndby menninir fingu ikki færri enn seks gul kort. Men tey sótu so mikið væl, at eingin av teirra monnum fekk tvey kort, og tískil vóru teir bláu og gulu fullmannaðir alla tíðina.

## Lyngby nýggjan leiklut

Í Parkini vóru 25.016 áskoðarar og teir nýttu góða veðrið og stóra spenningin. Lyngby var í vár við í toppstríðnum. Eftir sera soltið tíðarskeið, duttu teir niður í miðjuna í superliguni, men fram ímóti endanum á hesum kappingarárinum tykjast teir at hava fingið ein nýggjan leiklut í oddastríðnum.

Leikluturin er at arga liðini, sum kappast um DM. Mánakvøldið í síðstu viku vann Lyngby 2–1 í Brøndby, og í Parkini sunnudagin sást frá fyrsta bríksli, at gamla felagið hjá Toda Jónsson og nógvum øðrum FCK monnum ikki var komið á tjóðarleikvøllin fyri at vera statistar, meðan FCK spælararnir skuldu sóla sær til sigurin og harvið næstan meistaraheitið.

Lyngby var ágangandi, og tað var skjótt, at teir komu á odda. Miðvallarin Tobias Grahn fekk diagonalbólt úr vinstru, hann gjørdist leysur og sendi framvið norska FCK málverjanum, Thomas Myhre. So var 1–0 til gestirnar, og størsti parturin av veldugu áskoðarafjøldini hevði fingið sum vátan vøtt. Tvær ferðir fyrr í hesum kappingarárinum hevði Lyngby vunnið á FCK, og sjálvandi spøkti vandin fyri tapi hjá favorittunum og teirra stuðlum.

## Todi fleiri ferðir upp á spæl

FCK var kortini ikki fyri ongum. Teir høvdu bóltin nógv, og teir høvdu møguleikar. Og aftur hesa ferð vóru tað Sibisusa Zuma og Todi Jónsson, sum gjørdu um seg í álopinum. Zuma var um reppið at skora, tá 20 minuttir vóru farnir, og átta minuttir seinni sendi Todi Jónsson úr átjan metrum fríspark og mitt fyri upp um manngarðin og í tvørtræið.

Í 2. hálvleiki var intensiteturin framvegis stórur, og í 64. minutti eydnaðist tað at javna. Zuma kom leysur í vinstru, men innleggið var ikki serliga neyvt. Kortini eydnaðist tað Toda at temja og við høvdinum at stikla bóltinum frammanfyri sær, áðrenn hann stutt úr málinum vann nærdyst við fleiri mótstøðumenn og fekk bóltin inn um strikuna. Nú hevur Todi skorað tólv ferðir í hesum kappingarárinum. Hetta er væl meiri, enn hann nakrantíð áður hevur skorað eitt kappingarár í superliguni, og hann er eisini tann av FCK spælarunum, sum hevur skorað flest mál. Aftur hesa ferð metir heimasíðan hjá Ekstra-Blaðnum, at Todi var klárt besti maður á vøllinum.

Bara fimm minuttir eftir útjavnandi málið, valdi FCK venjarin, Roy Hodgson, at taka – í hvussu so er fyribils (ikki ov leingi, vóna vit! – fyrrverandi føroyska landsliðsmannin út. Fleiri søgdu seg ikki skilja útskiftingina serliga væl, tí Zuma og Todi og innanhýsis fatanin teirra millum hava hesa tíðina verið og eru framvegis hottasta samrøðuevnið í donskum fótbólti. Sum tað verður nevnt aðra staðni í blaðnum, so var orsøkin tann, at Todi hevði fingið ein lítlan løst.

Einki mál kom afturat, og tað vil siga, at Brøndby sigurin í Silkeborg hevði við sær, at í næstsíðsta umfarinum og uppgerðini í Parkini, har hvør einasti stólur verður upptikin 10. juni, er tað upp til bæði FCK og Brøndby spælararnar at gera av, um teirra lið skal vinna DM og harvið rættin til undankappingina til europeisku meistarakappingina. Meiri spennandi fær tað ikki verið hjá føroyska fótbóltsferðalagnum og hjá øllum útisetunum, sum ætla sær í Parkina, tá tey fara at halda norðoyarstevnu í Klaksvík!

KÍ-NSÍ 1-2 (0-2)

# NSÍ vann á tamum oddaliði

**Klaksvíkingar komu ongantíð rættiliga fyri seg í dystinum ímóti NSÍ, sum vann og fór fram um KÍ**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Eftir eitt frálíkt úrslit í Fuglafirði seinasta vikuskifti komu næstbestu klaksvíkingarnir niður aftur á jørðina hetta vikuskiftið, tá NSÍ vitjaði í Klaksvík.

Besta liðið hjá NSÍ hevur ikki fingið bilbukt við KÍ farnu vikurnar, men næstbesta liðið stóð seg betur ímóti klaksvíkingum.

Runavíkingar stríddust væl. Teir vóru væl skipaðir, høvdu nógv fólk aftanfyri bóltin, men vóru skjótir at leypa á, tá møguleikin var til staðar.

Jan Nónklett setti stundum ferð á NSÍ-liðið, og kviki miðvallarin stóð eisini fyri fyrsta málinum í dystinum. Hann kom at standa væl fyri í brotsteiginum og smekkaði til, KÍ-málverjin hálvbjargaði, bólturin endaði aftur hjá Jan, sum púra kaldur lyfti upp um málverjan og í málið.

Tað tóktist verða størri broddur í, tá NSÍ leypa á, hóast Poul Juul Vilhelmsen og hinir í KÍ-verjuni spældu væl. NSÍ'arnir vóru vandamiklari, og tað var langt ímillum KÍ-royndirnar í fyrra hálvleiki.

Tað vóru tó onkrar royndir, og í einu støðu sendi ídni Finn Baldvinsson á stongina úr spískum vinkli. Ein aðru ferð stútaði Poul Juul stutt fram við NSÍ-málinum.

## NSÍ økti

Beint fyri hálvleik økti NSÍ til 2-0, eftir eitt gott álop í høgru síðu, sum endaði við, at lagt var flatt innfyri málið. KÍ-málverjin togdi seg og fekk hondina á, men so var Fróði Jóannesarson fyrstur á bóltinum og sendi í tóma málið.

Tá liðini komu aftur frá hálvleikssteðginum royndi KÍ at trýsta NSÍ, men teir fingu ongantíð veruligt tak á. Ikki fyrr enn teir minkaðu til 2-1, tá innskifti John Ryan smekkaði til ein leysan bólt í NSÍ-brotsteiginum.

Seinasta korterið trýsti KÍ, og teir høvdu fleiri royndir á málið. Men NSÍ kláraði at halda bóltin burturi frá málinum, og so fóru runavíkingar avstað við øllum, hóast tað var heimaliðið sum var favorittur til at vinna dystin.

NSÍ tók seg við sigrinum fram um KÍ, sum tó er væl við í kappingini eftir fyrstu umførini.

**KÍ-NSÍ 1-2 (0-2)**
0-1: Jan Nónklett
0-2: Fróði Jóanesarson
1-2: John Ryan

# Súni á blettinum

**Súni Olsen skeyt tvey mál, tá FC Zwolle í seinast umfarinum staðfesti triðja plássið**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Næstbesta deildin í Hollandi hevði sín seinasta leikdag um vikuskiftið, og hóast tað longu var greitt, at Zwolle fór at enda ovarlaga, so løgdu teir sjálvandi eisini alt í hendan seinasta dystin. Við einum sigri kundi Zwolle nevnliga gerast sonevndur periodu-vinnari, og harvið staðfesta sína luttøku í endaspælinum, átta lið fara at dystast um teir báðar seinastu sessirnar í hollendsku heiðursdeildini.

## Tvey mál

Súni Olsen hevur aftur verið á sæð á besta liðnum hjá Zwolle í seinastuni, og eisini hesa ferð taldist hann millum teir fyrstu ellivu. Umframt at hann hesa ferð spældi allan dystin, so skoraði ungi gøtumaðurin eisini tvey mál í dystinum, og var talan her um fyrstu mál hansara í Hollandi.

Eftir dystin var tað eisini ein sera fegin og ikki minst spentur Súni Olsen, sum vit hittu á máli.

- Akkurát í løtuni gongur tað ótrúliga væl. Bæði persónliga og hjá liðnum. Vit skulu nú dystast við Volendam, Telstar og so anting Fortuna Sittard ella der Graafschap um eitt pláss í bestu deildini, og bæði Volendam og Telstar hava vit vunnið á fyri stuttari tíð síðani.

Hollendska skipanin er soleiðis, at bert fremsta liðið í deildini er tryggjað uppflyting. Síðani verða seks lið úr aðru deild og tvey úr fremstu deildini bólkað í tveir bólkar, har báðir bólkavinnararnir sleppa at spæla í bestu deildini komandi ár.

## Nógvir dystir

Hóast góða spælið seinastu tíðina, so telist Súni ikki millum teir, sum manna føroyska landsliðið til komandi uppgávurnar, og sjálvur tykist hann eisini eitt sindur vónbrotin av hesum, men frí frá fótbóltinum fær hann tó á ongan hátt.

- Fram til 19. juni verður talan um dyst tvær ferðir um vikuna hjá okkum, so tað verður í øllum førum sera spennandi, og sjálvandi vóni eg, at tað fer at eydnast okkum at koma í bestu deildina, sigur Súni Olsen at enda.